## Undirvísingar- og Mentamálstýrið
### Mentamáladeildin

# ENDURLÝSING
# Deildarleiðari
## til deildina fyri almanna- og heilsuútbúgvingarnar á Tvøroyri

Sjúkrasystraskúli Føroya fer, umframt at fevna um sjúkrasystraútbúgvingina, eisini at fevna um tær nýggju almanna- og heilsuútbúgvingarnar. Skúlin fer sostatt at hava tvær útbúgvingarrásir, og fer hvør rásin sær at hava ein deildarleiðara við fakligari og námsfrøðiligari ábyrgd, ið vísir til rektaran á skúlanum.

Avgjørt er, at deildin fyri almanna- og heilsuútbúgvingarnar skal liggja á Tvøroyri. Vegna broyttar umstøður í arbeiðsumhvørvinum verður lýst av nýggjum eftir deildarleiðara til almanna- og heilsuútbúgvingarnar.

**Vit sóknast eftir einum persóni, ið**
- hevur framhaldsútbúgving, ið kann metast at vera viðkomandi fyri almanna- og heilsuútbúgvingarnar.
- hevur vitan um og royndir innan útbúgvingarviðurskifti innan heilsuøkið og gjarna innan miðnámsútbúgvingar.
- hevur royndir innan námsfrøði og leiðslu til at røkja ta dagligu fakligu og námsfrøðiligu leiðsluna av almanna- og heilsuútbúgvingunum.
- skal kunna samstarva við hinar leiðararnar, til at skapa eitt mennandi og skapandi umhvørvi fyri næmingar, lærarar og starvsfólk.

**Høvuðsuppgávur**
- Hava dagligu leiðsluna av deildini um hendi
- Gerð av útbúgvingarætlan
- Fyrisiting og ábyrgd av útbúgvingunum
- Planleggja og gera tímatalvu, evnisarbeiði o.l.
- Viðgera mál viðvíkjandi næmingum
- Menningaruppgávur
- Undirvísa uml. helvtina av arbeiðstíðini

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag. Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um Undirvísingar- og Mentamálastýrið og stovnar tess. Setanarstaðið verður fyrst og fremst á Tvøroyri, men arbeiðið verður eisini í øðrum parti av landinum.

**Vit bjóða**
Eitt starv við avbjóðing, har tú verður við til at skapa sjálvt starvið, eins væl og ta víðari menningina í skúlanum.

**Umsókn**
við prógvum o.ø verður at senda til:

Undirvísingar- og Mentamálastýrið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 25.09.2000**, kl. 16.00.
Starvið verður at seta skjótast tilber.

Um tygum ynskja fleiri upplýsingar, herundir eina starvslýsing, kunna tygum ringja til Kristionnu S. Jacobsen, fulltrúa, á tlf. 355050.

***Undirvísingar- og Mentamálastýrið*** *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
***Sjúkrasystraskúli Føroya*** *hevur tvær útbúgvingarrásir, har onnur rásin er sjúkrasystraútbúgvingin, ið liggur í Tórshavn, og hin tær nýggju almanna- og heilsuútbúgvingarnar, ið skulu liggja á Tvøroyri. Sjúkrasystraútbúgvingin er ein miðallong framhaldsútbúgving á 45 mðr.. Almanna- og heilsuútbúgvingarnar umfata almanna- og heilsuhjálparaútbúgvingina, 1 ár, og almanna- og heilsurøktarútbúgvingina, 1½ ár. Í løtuni eru um 9 størv á Sjúkrasystraskúla Føroya, og økist hetta nakað, tá tann nýggja skipanin er farin at virka.*

## NORÐURLANDAHÚSIÐ

# Tiltøk í september 2000

**Málningaframsýningin hjá Hanne Juga, Finnland, er í húsinum til og við 15. september.**

**Tróndur Patursson hevur málningaframsýning í Íslandi.**

**Tiltak í Finnlandi við føroyskum barnabókum. Fyrskiparar: Hedvig Westerlund, Rakel Helmsdal, NiFin og Norðurlandahúsið**

**Sunnudagur 10. kl. 16.00**
Klassisk konsert. Sigurðurður Halldórsson, Ísland, spælir cello og Daniel Þorsteinsson, Ísland, spælir klaver. Spældar verða sonatir eftir Beethoven.
Fyriskipari: Konsertfelagið

**Mikudagur 13. kl. 19.30**
Vísukonsert v/Lars Klevstrand, Noreg, og Hanus G. Johansen

**Leygardagur 16.**
Norðurlendsk barnaheimsráðstevna

**Sunnudagur 17.**
Norðurlendsk barnaheimsráðstevna

**Mánadagur 18.**
Norðurlendsk barnaheimsráðstevna

**Leygardagur 23. kl. 18.00**
**Gospelfestivalurin 2000**
Luttakarar: Siloakórið v/Eyðun á Lakjuni, Dansibólkurin **A.2.J**., Heini Lützen, Eyðun Jacobsen, Elsebet Lindgaard, Danmark og Jan Honingdal, Noreg

**Sunnudagur 24. kl. 19.00**
**Gospelfestivalurin 2000**
Luttakarar: The Jesus band, Torkil Mørkøre, Liquvid Gravity, Dansibólkurin **A.2.J**, Salt brøður og I AM

**Hósdagur 28. kl. 19.30**
Klassisk konsert
Bohumila Jedlickova spælir upp á klaver.
Spæld verða verk eftir: Franz Schubert, Leos Janacek og Frederik Chopin

**Leygardagur 30.**
**kl. 16.00:** Pallborðsfundur í sambandi við »Vælskapt Brek«
**kl. 19.30:** Konsert við løgum frá sangkappingin í »Vælskapt Brek«

**Broytingar í skránni kunnu koma fyri.**
**Høvi er at keypa te, kaffi, sodavatn, øl, breyð, køkur o.a. í kaffistovuni.**

**Húsið er opið gerandisdagar kl. 10.00–18.00 og sunnudagar kl. 14.00–18.00**
**Kaffistovan er opin, tá ið húsið er opið.**

**Norðurlandahúsið í Føroyum**
**Telefon 317900 · Fax 319790**
**e-mail: nlh@nlh.fo; http://www.nlh.fo**
Tekstvarp í SvF frá síðu 650

## Akfar til sølu

Vegna konkursbúgv verður akfarið Renault 1,6, árg. 1999 við hesum lýst til sølu.

Akfarið kann síggjast eftir nærri avtalu, og verða áhugað biðin um at venda sær til

**Petur Even Djurhuus, kurator**
**Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn**
**Tlf. 31 12 60**

Í sambandi við søluna tilskilar búgvið sær rætt til frítt at velja millum innkomin tilboð, herundir at vraka øll.

## JUDO
**Venjingartíðir**
**í fimleikarhøll Eysturskúlans**

Nú byrjar judovenjingin aftur.

Tilmelding av nýggjum limum verður mánadagin 11. september kl. 18.00–19.00.

**Venjingartíðir**
Nýggir limir:

| | |
|---|---|
| Mánadag og mikudag kl. 18.00–19.15 | Børn |
| Mánadag og mikudag kl. 19.20–21.00 | Blandað lið |
| Fríggjadag kl. 19.30–21.00 | Vaksin |

**Havnar Judofelag**

## Føroya náttúru- og umhvørvisverndarfelag (FNU)

Aðalfundur felagsins verður á Hotel Hafnia **sunnudagin hin 24. september, kl. 16.**
Skrá sambært lógini.

**Nevndin**



# EDV-fólk

Føroya Shell sóknast eftir einum dugnaligum fólki at taka sær av KT-uppgávum. Starvið er fjøltáttað og útbúgvingarmøguleikarnir góðir.

**Arbeiðsøki**
Í høvuðsheitum fevnir arbeiðsøkið um:

- servararakstur og viðlíkahald
- hjálp og vegleiðing til brúkarar, bæði hvat teldum og forritum viðvíkur
- installatiónsuppgávur
- dátugrunnafyrispurningar
- umsiting av trygdarskipanum
- umsiting av intraneti
- dokumentatión
- støðugt vera við til at menna KT-umhvørvið
- luttøku í nýggjum verkætlanum.

**Førleikakrøv**
Vit hugsa okkum at tú:

- hevur hóskandi EDV-útbúgving
- hevur kunnleika til netskipanir
- hevur kunnleika til dátugrunnar
- dámar væl at veita góða tænastu
- hevur góð evni til at arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst
- setir arbeiðsgleði og gott sinnalag í hásætið.

**Vit bjóða:**
- góð arbeiðsviðurskifti
- góða løn við eftirlønaskipan í samsvari við útbúgving og royndir
- góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

**Áhugaður?**
Hevur hetta tín áhuga, so send okkum eina umsókn innan 22. september.
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Palla Petersen á tel. 34 74 00. Adressan er:

**P/F Føroya Shell, Postbox 188, FO-110 Tórshavn**

**Shell**

made by VIT

## Samskipari til menningardeild okkara

Til menningardeild okkara søkja vit eftir einum samskipara at byrja beinanvegin. Ert tú útbúgvin datamatikari ella hevur útbúgving/royndir á sama stigi, er starvið sum samskipari á menningardeild okkara kanska nakað fyri teg.

Sum samskipari á menningardeild okkara fært tú ábyrgd av, at samskipa menningina av KT-verkætlanum, so sum:

- Dynamiskar webloysnir
- e-business loysnir
- Standardskipanir

Hevur tú hug at royna teg sum samskipara í einari dynamiskari og spennandi fyritøku í vøkrum umhvørvi undir Bryggjubakka, so er bert at senda okkum eina umsókn við upplýsingum um útbúgving, royndir o.a.

Løn og arbeiðstíðir verða at avtala nærri.

Um tú hevur hug at vita meira um starvið sum samskipari á menningardeild okkara, ert tú vælkomin at ringja 319914 og spyrja eftir Óla Olsen.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 22. september 2000

P/F VIT - undir Bryggjubakka 17 - FO-100 Tórshavn
tlf: 31 99 14 - e-mail: vit@vit.fo - url: www.vit.fo

P/F VIT er ein KT-fyritøka, sum arbeiðir við menning av dynamiskum Webloysnum, ráðgeving innan E-business & umsiting av teldunetum. Umframt hetta eigur og rekur P/F VIT internetportalin in.fo. 10 fólk starvast í løtuni hjá P/F VIT - Farodane eigur 80% av P/F VIT og starvsfólkini eiga hini 20%.

**www.wenzel.fo**
Ford

# Fá títt lívsins "kick"!

Lær fremmant mál og mentanir!
Lær um tænastu, sølu og persónliga menning!

Far á ferðaleiðaraskúla í november 2000 á Costa Brava, og blív ferðaleiðari til veturin í summar og sól!

500 arbeiða í øllum heiminum – skúlin tryggjar øllum útbúnum og egnaðum ferðaleiðarum starv.

Service & Co er størsti og ídnasti ferðaleiðaraskúlin í Skandinavia. Har verða ferðaleiðarir útbúnir til alla ferðavinnuna.

Bílegg ein faldara á heimasíðuni:
www.service-co.dk

Ella ring til Toru Tourist Traffic í Tórshavn á tel. 31 55 05 og fá ein faldara sendan heim til tín. Uffe á Toru Tourist hevur verið á skeiðið hjá Service & Co og kann svara øllum spurningum.

**SERVICE&CO**
DANMARKS INTERNATIONALE SERVICESKOLE

## Suðuroyar Ellis- & Røktarheim

Vegna farloyvi verður søkt eftir:

Sjúkrasystir við 0,8 arbeiðstíð í skiftandi vaktum frá 1. oktober 2000 til 30. apríl 2001.

Sjúkrasystir við 0,7 arbeiðstíð í skiftandi vaktum frá 1. oktober 2000 til 30. september 2001.

Sjúkrasystir við 0,6 arbeiðstíð í skiftandi vaktum frá 1. oktober 2000 til 31. mai 2001.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi størvunum kunnu fáast við at venda sær til fyristøðukvinnuna, tlf. 371666 lokal 147.

Umsóknir við avriti av prógvum verða at senda til:

**Suðuroyar Ellis- & Røktarheim**
**Fyristøðukvinnan**
**Postboks 51,**
**800 Tvøroyri**

innan 25. september 2000.



## Lærlingur

Hevur tú hug at arbeiða í handli, so er møguleiki at fáa læruplass hjá okkum. Læran kemur at umfata samskifti við viðskiftafólk, útkoyring og bílegging av vørum og mangt annað.

Væntað verður at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt, er fyrikomandi og hevur hug at veita viðskiftafólki okkara eina góða tænastu.

Fyri at koma í læru er tað ein treyt, at tú hevur koyrikort og FHS ella HH.

Skrivlig umsókn verður at senda til okkum í seinasta lagi 23.09.2000.

demich
Stiðjagøta 2 · Postboks 378
FO-110 Tórshavn
Tlf. 311071 · Fax 310460
e-mail: demich@post.olivant.fo

## Útróðrarbáturin

M/B Havfarið til sølu.

**Tlf. 457735** ella **220086**